

# Búskaparligu avleiðingarnar av Covid-19

*(Umskriving av uppriti um búskaparligu avleiðingarnar av Covid-19 frá Fíggjarmálaráðnum 15. apríl 2020. Støði: Uml. 9. flokkur.)*

## Heilsukreppan, ið gjørdist ein búskaparkreppa

Búskaparliga virksemið í Føroyum og aðrastaðni er minkað av Covid-19 og smittutálmandi tiltøkunum, sum eru sett í verk. Fyri samfelagið hevur tað stóran týdning, at heilsuverkið ikki verður ovbyrjað av ov nógvum smittaðum og sjúkum samstundis. Tó merkir hetta, at stórir partar av búskapinum eru afturlatnir í løtuni. Inntøkurnar eru tí lækkaðar nógv.

Tá búskapin verður latin uppaftur, fara inntøkurnar at koma aftur. Vara tiltøkini leingi er tó vandi fyri, at borgarar og fyritøkur koma í varandi kreppu við høgum arbeiðsloysi og fólkafráflyting. Hetta kann merkja, at føroyski búskapurin minkar, og ikki kemur uppaftur á støðið áðrenn kreppuna fyrr enn um fleiri ár.

## Føroyski búskapurin er sterkur

Løgting, Landsstýri, kommunur og almennir grunnar hava tørv á metingum av búskaparvøkstrinum og inntøkuvøkstrinum komandi árini. Hendan vitan er neyðug, tá fíggjarlógin hjá Landinum og fíggjarætlanir hjá kommununum skulu gerast fyri 2021 ("Landið" er eitt felagsheiti fyri Løgting og Landsstýri.). Eisini Arbeiðsloysisskipanin (ALS), ið er ein almennur grunnur, hevur tørv á at vita, hvussu stórt arbeiðsloysið verður komandi tíðina.

Fíggjarmálaráðið er tann parturin av Landsstýrinum, ið fæst við fíggjarmálini. Eisini standa tey fyri at gera fíggjarlógina hjá Landinum. Fíggjarmálaráðið metir, at útgangsstøðið hjá føroyska búskapinum er gott. Búskapurin er væl fyri at standa ímóti einari búskaparligari afturgongd.

Føroyski búskapurin hevur verið í hákonjunkturi í fleiri ár. Hetta hevur havt hesi góðu árin:

- Fólkatilflyting hevur verið síðani 2014
- Arbeiðsloysið er metlágt
- Løntakaratalið er methøgt
- Almenna skuldin er ikki høg
- Samfelagið hevur stóra netto-ogn mótvegis útlondum
- Flestu húsarhald eru fíggjarliga væl fyri uttan høga skuld
- Stórur partur av vinnulívinum eru fíggjarliga væl fyri uttan høga skuld

Føroyska samfelagið kann tí standa ímóti einari afturgongd í búskapinum og Landið kann seta fíggjarpolitisk tiltøk í verk fyri at tálma afturgongdina, sum verður í 2020 og helst eisini í 2021.

## Búskaparligar avleiðingar av Covid-19

Covid-19 og smittutálmandi tiltøkini hava fingið borgarar og fyritøkur at broyta atburð. Tí eru bæði útboð og eftirspurningur lækkað.

Útboðið er lækkað, tí trupult er hjá summum vinnum at fáa arbeiðmegi. Summi fólk eru í sóttarhaldi og summi mugu arbeiða í minni toymum. Eisini hava vøggustovur, barnagarðar og skúlar verið afturlatin og gjørt tað trupult hjá foreldrum at arbeiða. Alt hetta hevur ført við sær lægri inntøkur og lækkandi produktivitet.

Eftirspurningurin er eisini lækkaður. Fólk hava verið nógv heima seinastu tíðina og hava tí ikki brúkt so nógvar pengar. Óvissan um framtíðina fær eisini brúkarar at útseta keyp av ymiskum vørum. Serliga hesar vinnugreinar hava upplivað lægri eftirspurning, nú samfelagið er farið niður í ferð:

- Matstovur og líknandi
- Handilsvinnan
- Upplivingarvinnan
- Flog-, flutnings- og ferðavinnan
- Onnur tænastuvinna

Eisini aðrar vinnugreinar eru ávirkaðar óbeinleiðis, til dømis fyritøkur, sum veita vørur og tænastur til omanfyri nevndu vinnur. Dømi: Um matstovur lata aftur, keypa tær heldur ikki mat frá heilsølum, bóndum o.a.

Óvissan um komandi 1-2 árini kann eisini fáa fyritøkur at útseta íløgur og útbyggingar av teirra framleiðsluorku. Hinvegin hava summar fyritøkur brúkt høvið til at gera umvælingar, meðan tey hava verið afturlatin. Sostatt hava handverkarar havt nógv at gera seinastu tíðina.

Útflutningsvinnur eru eisini ávirkaðar av støðuni. Torført er at útflyta saltfisk til Suðureuropa í løtuni og nøkur virki hava longu latið aftur fyribils. Vøruflutningur riggar sum heild illa, og serliga trupult er at flyta vørur við flogførum. Eisini hava fólk í nógvum øðrum londum fingið verri ráð at keypa føroyskar vørur. Útflutningurin í 2020 verður tí minni í 2019. Minni nøgdir verða seldar, men harumframt lækkar prísurin eisini. Tað ger ilt verri.

## Hvussu nógv fer búskapurin at minka?

Fíggjarmálaráðið roknar við, at búskapurin kann minka 3-10% í føstum prísum í 2020 orsakað av Covid-19. Ber til at lata búskapin uppaftur eftir stuttari tíð og kemur heimsbúskapin í gongd aftur eftir stuttari tíð, kann afturgongdin gerast um 3-5%.

Verður hinvegin talan um eitt longri tíðarskeið á fleiri mánaðir ella longri, og verður stór og drúgv afturgongd í heimsbúskapinum, kann búskapurin minka í minsta lagi 10%.

Metingarnar hjá Fíggjarmálaráðnum samsvara við metingar hjá danska tjóðbankanum og OECD (Altjóða felagsskapur fyri búskaparligt samstarv og menning). Danski tjóðbankin roknar til dømis við, at danski búskapurin minkar 3-10% í 2020, og at stígur helst verður í búskapinum í 2021, áðrenn búskapargongdin

verður meira vanlig aftur. OECD metir, at búskapirnir minka umleið 2% fyri hvønn mánað, tey hørðu Covid-19-tiltøkini eru í gildi.

Ein lítil og opin búskapur sum tann føroyski verður minst líka hart raktur sum størri lond. Føroyar útflyta matvørur til Europa, USA, Russland, Kina og onnur lond. Minkar keypsorkan á hesum marknaðum, fer hetta eisini at ávirka virðið á føroyska útflutninginum – bæði í nøgd og prísi. Eisini hava Føroyar havt sera stórar inntøkur av ferðavinnuni seinastu árini, og hesar inntøkur vanta nú í føroyska búskapinum.

## Landið kann tálma búskaparkreppum

Tað hevur stóran týdning, hvussu føroyska samfelagið kemur burturúr aftur kreppuni. Almenni geirin, serliga Landið, má tryggja, at vinnulig arbeiðspláss eru, tá samfelagið einaferð letur upp aftur. Grannalond okkara lata tí stórar hjálparpakkar, sum skulu avmarka missin í privata geiranum og fyribyrgja, at samlaði eftirspurningurin minkar ov nógv.

Higartil hevur Løgtingið samtykt Hjálparpakka I og Hjálparpakka II frá Landsstýrinum.

Fíggjarmálaráðið vísir á, at neyðugt er at finna eina skilagóða javnvág millum heilsuatlit og búskaparatlit. Seinastu mánaðirnar hava heilsuatlitini vigað tyngri, men framyvir fara búskaparligu atlitini at fáa størri tyngd.

## Avleiðingarnar fyri landskassan

Fíggjarmálaráðið væntar, at landskassin kann fáa hall á um 800 mió. kr. í 2020 og møguliga nakað minni í 2021. Fíggjarlógin fyri 2020 varð gjørd í 2019 áðrenn Covid-19-farsóttina, men inntøkurnar verða nú munandi lægri enn væntað. Dømi um inntøkumissir eru hesir:

- Vanligi landsskatturin verður lægri
- Minni innflutningur, minni umsetningur og ógvuslig lækking í oljuprísunum fara at geva minni meirvirðisgjald (MVG) enn roknað varð við
- Partafelagsskatturin verður ávirkaður í 2021, tá feløg skulu rinda skatt av avlopinum í 2020
- Kapitalvinningsskatturin verður ávirkaður bæði í 2020 og 2021

Eisini fær landskassin nakrar eyka útreiðslur. Eykajáttanir mugu játtast til heilsuøkið og almannaøkið.

Mett verður, at umleið ¼ av ávirkanini á úrslitið hjá landskassanum verða eykaútreiðslur og at umleið ¾ av ávirkanini verða lægri inntøkur.

Fíggjarmálaráðið metir, at landið tolir hall í nøkur ár og harav vaksandi skuld. Rentuútreiðslurnar hjá landinum fara tí at hækka. Tó er rentustøðið í løtuni sera lágt, so tað er rímiliga bíligt at taka lán.

Smá lond sum Føroyar uttan egið gjaldoyra hava ikki møguleika at lána nógvar pengar í senn. Lána Føroyar ov nógv, vil kredittvirðið hjá landinum lækka, og tá fara lángevarar at krevja hægri rentu. Føroyska almenna skuldin er tó so lág, at landið kann fíggja stór almenn hall í nøkur ár og økja skuldina í stigum, uttan at hetta ávirkar kredittvirði og rentu munandi.



## Ymisk sløg av búskaparkreppum

Kreppur kunnu henda á fýra hættir:

- V-kreppa: “Skjótt niður, skjótt upp”. Covid-19 og fyribyrgjandi tiltøkini ávirka búskapin nógv, men búskapurin kemur skjótt fyri seg aftaná og vinnur nakað av mistu framleiðsluni innaftur.
- U-kreppa: “Spakuliga niður, spakuliga upp”. Hendan kreppan er nakað verri enn V-kreppan. Búskapurin kemur ikki eins væl og skjótt fyri seg, men viðførir hægri arbeiðsloysi og húsagangir, ið ávirka bæði brúk og íløgur.
- L-kreppa “Skjótt niður og sera spakuliga upp”. Hendan kreppan er sera ógvuslig. Húsagangir og uppsagnir viðføra arbeiðsloysi, sum raka framleiðsluna og almennu inntøkurnar meint. Hendan støðan kann íkoma, um undantaksstøðan dregur langt út ella um búskapurin verður raktur av eini aðru smittubylgju.
- W-kreppa: “Dupult dypp”. Hendan kreppan minnir um L-kreppuna. Ein W-kreppa kann av fyrstan tíð síggja út sum ein V-kreppa, men á veg upp aftur kavar búskapurin aftur, til dømis um smittan kemur aftur.

Møguleiki er fyri eini aðru smittubylgju í heyst, sum aftur kann steðga búskapinum og trýsta almennu kassarnar enn meira. Hendan støðan kann eisini føra við sær fráflyting, sum kann hava longri varandi ávirkan og trýsta haldførið í almenna búskapinum og búskapin sum heild.

Talvurnar niðanfyri vísa metingarnar hjá Fíggjarmálaráðnum um, hvat kann henda alt eftir slagi av kreppu:

| **V-kreppa** | **2020** | **2021** |
|---|---|---|
| BTÚ (broyting, fastir prísir) | minkar 3-5% | hækkar 1-3% |
| Úrslit hjá landskassanum | 800-1.000 mió. kr. í halli | 300-500 mió. kr. í halli |
| Landskassaskuld brutto | um 23% av BTÚ | um 24% av BTÚ |

| **U-kreppa** | **2020** | **2021** |
|---|---|---|
| BTÚ (broyting, fastir prísir) | minkar 5-7% | óbroytt BTÚ |
| Úrslit hjá landskassanum | 1.000-1.200 mió. kr. í halli | um ½ mia. kr. í halli |
| Landskassaskuld brutto | um 24% av BTÚ | um 27% av BTÚ |

| **L-kreppa ella W-kreppa** | **2020** | **2021** |
|---|---|---|
| BTÚ (broyting, fastir prísir) | minkar 7-10% | minkar 1-2% |
| Úrslit hjá landskassanum | 1.200-1.500 mió. kr. í halli | 600-800 mió. kr. í halli |
| Landskassaskuld brutto | um 26% av BTÚ | um 30% av BTÚ |

**V-kreppa (USA)**



**U-kreppa (USA)**



**L-kreppa (Japan)**



**W-kreppa (USA)**



*Kelda: JayHenry, 2009, Wikipedia → Recession shapes*
*Bláa strikan vísir búskaparvøkstur í tíðarskeiðnum.*
*Reyða strikan vísir meðalbúskaparvøkstur yvir longri tíðarskeið.*